asti mótstøðumaðurin var litti Jesse Jackson. Á Super Tuesday vann Gore statirnar Arkansas, North Carolina, Kentucky, Nevada, Tennessee og Oklahoma. Seinni tók hann seg kortini úr valinum, sum Michael Dukakis at enda vann.

9. juli 1992 valdi Bill Clinton Al Gore sum sín varaforseta. Gore hevði framman undan gjørt av, ikki at stilla upp til forvalið til forsetavalið. Hetta komst fyrst og fremst av, at 10-ára gamli sonur Al Gore, Albert III, næstan misti lívið í einari bilvanlukku, tá hann var á veg út av stadion eftir ein basketball dyst. Orsakað av longu lekingartíðini gjødri Al Gore av at vera nær soninum. Tískil gjørdist eingin tíð til forvalið.

Sum kunnugt vunnu Bill Clinton og Al Gore í 1992, og Al Gore tók við sum 45. amerikanski varaforsetin 20. januar 1993. Undir Clinton-stjórnini vaks amerikanski búskapurin munandi, sambært David Greenberg, professara við Rutgers Universitetið, samstundis sum arbeiðsloysið var hitt lægsta síðani 1970-ini.

Sum kunnugt vann makkaraparið 1996 forsetavalið eisini.

Al Gore stillaði upp til forsetavalið í 2000 har hann valdi Joe Lieberman sum sín varaforseta. Sum tey flestu minnast gjørdist valið ógvuliga spennandi. Fyrst søgdu SV-støðirnar, at Gore hevði vunnið í Florida, síðani tóku tær tað aftur, seinni søgdu tær, at Bush hevði vunnið fyri so at taka eisini tað aftur.

Tað endaði við, at republikanski innanstatsráðharrin, Katherine Harris, kravdi atkvøðurnar taldar umaftur. Gore fór til hægstarætt fyri at steðga umteljingini, og tað gjørdi hægstirættur so nakrar vikur seinni. Hetta førdi til, at Bush vann Florida við 534 atkvøðum og gav honum teir 27 valmenninar og harvið forsetaembætið. Gore fekk samlað einar 500.000 atkvøður fleiri enn George Bush. Men hann fekk kortini bert 266 valmenn móti teimum 271 hjá Bush.

Al Gore var ein upplagdur kandidatur til forsetavalið í 2004 eisini, men longu í desember 2002 boðaði hann frá, at hann stillaði ikki upp til valið í 2004.

- Persónliga havi eg orkuna, viljan og ambitiónina at fremja eina valherferð aftrat, men eg haldi kortini ikki, at tað er tað rætta fyri meg. Ein umdystur millum meg og Bush hevði sett fokus á tað farna, og ikki á framtíðina, sum eg haldi er tað rætta, greiddi Al Gore frá.

Hann fekk tó stóran kritikk, tá hann bjóðaði seg fram sum Governor of Vermont Howard Dean í kapping móti eitt nú fyrrverandi varaforseta valevni sínum, Joe Lieberman. Millum kritikararnar var eisini John Kerry.

Seinni segði Al Gore seg stuðla John Kerry sum forsetavalevni í 2004 saman við Bill Clinton og Jimmy Carter.

Al Gore var ongantíð veruliga ein møguleiki í forvalinum í ár, men ein kanning í desember 2007 gav Al Gore 17% av atkvøðunum á øðrum plássi aftan fyri Hillary Clinton, ájavnur við Barrack Obama og framman fyri John Edwards.



*Hóast hann var ímóti Vietnam-krígnum, meldaði Al Gore seg inn í amerikanska herin í 1969. Í 1971 varð hann sendur til Vietnam at gera tænastu*

## Umhvørvið

Sambært the Concorde Monitor, var »Gore (var) ein av fyrstu politikarunum, sum skilti álvaran í klimabroytingunum, og tað neyðuga í at minka um útlátið av $CO_2$ og øðrum vakstrarhúsgassum. Hann skipaði fyri fyrstu kongresshoyringini um evnið longu seint í 1970-unum. Somuleiðis var hann við í Academy Award-vinnandi dokumentarfilminum frá 2006, ”An Unconvenient Truth”. Filmurin dokumenterar prógv fyri menniskjaligari globalari upphiting og ávarar móti avleiðingunum, um fólk ikki beinanvegin broyta hugburð«.

Kritiskar røddir hava víst á, at privata heimið hjá Al Gore, sambært eini frágreiðing hjá Nashville Electric Service, brúkar millum 12 og 20 ferðir so nógv elektrisitet sum eini vanlig setthús. Men The Detroit Free Press sigur, at Al Gore seinastu tríggjar mánaðirnar hevur keypt 108 blokkar av grønari orku um mánaðin. Tað kostar honum 432 dollarar eyka um mánaðin og svarar til endurvinning av 2.48 milliónum av aluminiumdunkum ella 143.046 kilo av avísum. AP segði 13. desember 2007, at Al Gore hevur framt eina røð av broytingum í húsunum fyri at gera tey so umhvørvisvinarlig sum gjørligt.

Eisini U.S. Green Building Counsil rósar Gore fyri at hugsa um umhvørvið í sambandi við síni egnu hús.

Fyri arbeiðið sítt innan globala upphiting og umhvørvið fekk Al Gore í fjør Friðarheiðursløn Nobels. Hana fekk hann saman við Intergovernmental Panel on Climate Change, hvørs leiðari er Rajendra K. Pachauri frá Dehli í Indina. Heiðurslønin varð givin fyri »at uppbyggja og breiða út størri vitan um menniskjaelvdar klimabroytingar, og fyri at leggja grundarlagið undir neyðugum broytingum í hesum sambandi«.

Gore og Pachauri tóku móti heiðursløninni 10. desember 2007 í Oslo




**Tað er við umhvørvinum sum við veðrinum, øll tosa um tað**…
Á Føroyaprent gera vit meira enn at tosa! Føroyaprent er einasta føroyska virki, ið er góðkent eftir tí Norðurlendska svanamerkinum.

**Vilt tú** tryggja tær, at tínir prentlutir eru framleiddir við umhvørvinum í huga, so prenta teir á einari svanamerktari prentsmiðju.
Vilt tú, at **tíni viðskiftafólk** skulu vita, at tú hugsar um umhvørvið, so lat prentlutirnar vera svanamerktar.

Føroyaprent
www.foroyaprent.fo